# ngasands í dag



*Ein góðan dag kunnu teir tøma oman fyri 30 tangar um dagin. Er nógv at tøma, og illa er komandi til, kann talið bert verða níggju tangar*
Mynd: Jens Kr. Vang

runnar og greinar fyri at koma fram til tangan, men í hesum sethúsunum í Streymnesi er tangin so nær tí optimala sum tilber.

- Tá vit eru í Havn tekur tað munandi longri tíð. Tá er komið fyri, at vit ikki klára meiri enn einar níggju tangar um dagin.

- Men tá vit hinvegin eru á bygd, kunnu vit lættliga klára bæði 30 og 40 tangar eftir einum degi!, sigur Heri.

Hetta hevur sjálvandi sína frágreiðing: Høvuðsorsøkin til henda stóra munin er, at tað búgva fleiri fólk í hvørjum húsi í Havn og tí er sjálvandi meiri at tøma.

Tað er helst so sum Heri sigur: - Í Havn býr fólk í hvørjum kjallara, og tí eru fleiri um hvønn tangan!

Tá talan er um útjaðarin eru fleiri summarhús ella sethús har bara eitt ella tvey fólk búgva í.

Har er rættiliga avmarkað, hvussu nógv er at tøma og tí klára teir fleiri tangar í slíkum førum.

## Hálvtannað ár síðani seinast

Tá ein tangi er tømdur, verður lokið lagt á, men áðrenn teir fara avstað, verður ein gulur seðil festur við lokið á tanganum.

- Á hesum seðilin stendur árstalið 2007. So sleppa fólk undan at ringja til IRF at spyrja, um vit hava tømt tangan ella ikki, sigur Heri.

Skipanin við tømingini av rottangunum er, at teir taka øki fyri øki, bygd fyri bygd og hús fyri hús.

Hetta vil aftur siga, at nú gera teir seg lidnar her og fara síðani til bygdirnar norðanfyri á Streymoynni, áðrenn teir fara yvir um Sundalagið at taka bygdirnar frá Oyri og norður til Eiðis, og fara síðani út á Skálafjørðin.

- T á vit so hava verð á øllum støðunum hjá IRF koma vit aftur higar til Streymnesar. Eg haldi, at tað er umleið hálvtannað ár síðani vit vóru her seinast.


# Vit ynskja øllum eina góða sundalagsstevnu!




## Tann føroyska húsaloysnin

– fá húsini júst sum TÚ vilt hava tey!

- Styttri byggitíð, lægri rentuútreiðslur
- Ongar eyka útreiðslur til byggitekningar
- Norðsetur útvegar og avgreiðir byggiloyvið
- Møguleika at tillaga tey ymsu sniðini eftir egnum ynski
- Húsini kunnu latast keyparanum liðug og klár at flyta inn í, ella sum byggisett





NORÐSETUR HÚS

450 Hvalvík · Tel. 422 277 · Fax 422 398 · nordset@post.olivant.fo · www.nordsetur.fo